# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Til minnis um Janu Jensen



Góða Jana, nú tú ert fari heim til Hansara, ið øllum valdar, eru vit mong, sum sakna teg fyri alt, tú vart fyri okkum. Tú hevur verið ein góð systir, mamma, kona og omma fyri øll tíni, sum tú varðaði av. Eg fari aldri at gloyma, hvussu góð tú vart við meg, tá ið eg kom í heim tykkara at verða, bert 2 ára gamal. Sum árini gingu, kann eg nú á ellisárum enn minnast, hvussu góður eg bleiv við teg.

Meðan eg enn var í skúlaaldri, bleivst tú sjúk av tuberklum. Eina tíð, meðan tú lást á Sanatoriinum, var einki mót um, at tú fórt at klára sjúkuna, so tú bleivst send heim at doyggja. Um hetta mundið fór spanska sjúka at ganga, og mong blivu smittaði víða hvar um landið. Tú bleivst eisini sjúk av hesi herviligu sótt, soleiðis at læknin bleiv boðsendur at vita, hvat hann kundi gera. Hann gjørdist bilsin, tá ið hann var liðugur við kanningar sínar og spurdi teg, hvussu tú føldi teg, og tú kundi svara honum, at tú føldi teg væl.

»Ja, tað kanst tú siga«, segði læknin, »tí spanska sjúkan hevur vunnið á tuberklunum, so nú ert tú frísk«.

Og, góða Jana, soleiðis var, og tú hevur verið frísk, til tú nú legði frá tær, mett av døgum, 96 ára gomul. So tað kann ikki annað sigast, enn at tú fekst eitt gott lív, hóast tína sjúku sum ung.

Tøkk øll somul, sum verið hava so væl um Janu á hennara ellisdøgum og nú til tað síðsta.

Eg fari her saman við øllum mínum at lýsa frið yvir minnið títt og takka fyri, at tú gjørdist systir mín, tá ið eg 2 ára gamal kom í heim títt at búgva og vaksa upp sum ein av tykkara.

**Alfred Klein**

## Dagurin

**9. juli. Sostrata.** Hetta grikska kvinnunavnið er einki kent halgimennisnavn. Dagurin hevur borið ymisk onnur nøvn, men frá árinum 1726 kemur navnið Sostrata í álmanakkarnar.

# Palli Dalsgaard 80 ár

Mánadagin 14. juli fyllir Palli Dalsgaard í Skálavík 80 ár.

Palli er føddur og uppvaksin í Skálavík, sonur Astrid, f. Jacobsen, úr Skopun, og Axel Dalsgaard, á Mølini í Skálavík.

Størsta partin av lívi sínum hevur Palli koyrt rutukoyring millum bygdirnar í Sandoynni. Henda rutukoyring við mjólk, frakt og posti, varð ofta koyrd undir sera ringum umstøðum. Allar bilumvælingarnar vórðu gjørdar í bilhúsinum sum pápin, Axel Dalsgaard, og synirnir høvdu í Skálavík.

Hóast Palli ongan annan skúla hevði enn barnaskúlan, lærdi hann nógv av teimum fólkum, hann hevur verið saman við, sum t.d. í handlinum á Mølini í Skálvík. Palli sigur, at fyri honum var handilin ein skúli.

Eisini var hann sum ungur nógv saman við fólki í Skopun, sum høvdu verið á háskúla í Danmark, og lærdi hann nógv av teimum. Veturin 1972-73 var Palli



umskúlaður á skúlanum norðuri við Áir.

Í 1973-74 hevði hann skrivstovustarv á Royndarstøðini í Hoyvík. Eftir tað fekk hann starv á Bil- & Maskinverkstaðnum á Sandi. Hetta starv røkti hann í 18 ár.

Palli hevur altíð havt hug at skriva, vit síggja ofta hansara lesarabrøv í bløðunum. Hann hevur eisini savnað hópin av tilfari um bilasøguna í Sandoynni fyri áhugafelagið Føroya Ellisakfør.

Fyri fimm árum síðan gav Palli út eina sera snøgga og áhugaverda bók við heitinum ”Staðanøvn uttangarðs í Skálavík”. Bókin er um staðanøvn sum Leifur Tróndarson (1901-1980) í Skálavík hevur savnað.

Palli giftist við Ragnhild (1933-1997), f. Joensen, úr Skálavík. Ragnhild og Palli fingu fýra børn, tey eru: Jovina, Atli, Maria og Anthonius.

Føðingardagurin verður hildin á Keldu í Skálavík leygardagin 12. juli kl. 17.

# Millumskúlaflokkur útferð í Nólsoy

Mynd frá ”Realskúlaframsýningini 1916-66”, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Myndin er frá eini útferð í Nólsoy hjá einum millumskúlaflokki skúlaárið 1948-49

*Aftast f.v: Poul Sloan og Fróði Mouritsen*

*3. rað f.v.: Birna Helmsdal, Jákup Lindenskov, Eyð Niclasen, Martin Holm (flokslærari), Malena Clementsen, Andreas Johansen (Lítli), Arni Isholm og Andreas Reinert.*

*2. rað f.v.: Anna Simonsen, Hervør Joensen, Sólvá Mikkelsen, Hansina Jacobsen, Elsebeth Sloan, Margretha Mohr (Diddan), Tordis Mohr, Katrin Hansen og Símun Simonsen.*

*Fremst f.v.: Kári Petersen og Anders Hansen.*

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (Mynd nr. 39)

*Myndaeigari: Katrin Samuelsen / Margit Hansen*

